## Løgmaður um skattalættan

Ikki óvæntað fingu skattalættarnir hjá samgonguni drúgva og hvassorðaða móttøku. Tað ber altíð til at finna skeivleikar og okkurt, sum kundi verið øðrvísi frágingið í slíkum málum. Men eitt aðalmál var at hækka loftið fyri, nær ymsu inntøkurnar vórðu toppskattaðar. Áðrenn fyrsta skattalættan var hetta loft 185.000 kr. Hetta loft verður komandi árskifti 270.000 kr., og tá kunnu eisini handverkarar og onnur fólk við miðalinntøku sleppa undan toppskatti av seinast vunnu krónunum. Í løtuni arbeiðir landsstýrið við einum nýggjum og áhugaverdum skattapolitiskum uppskoti, ið minkar um misjavnan millum ymsu inntøkubólkarnar og misjavnan millum øki í landinum.



P SA

## ...Um skúlan

Fólkaskúlin, okkara skúlapolitiski grundvøllur, skalv, tá úrslitið av PISA-undankanningini kom undan kavi. Tað hevði við sær, at stórt spurnartekin varð sett við dygdina á okkara fólkaskúla. Uttan at leypa framav, varð støðan eftirmett, og fleiri uppskot at betra um fólkaskúlan vórðu orðað. Ein partur av teimum er longu settur í verk. Millum annað verður tímatalið í byrjanarundirvísingini næstu tvey skúlaárini økt við til samans 16 vikutímum.



- Tankin um eina fólkaatkvøðu um nýggja valskipan er áhugaverdur. Eg kundi hugsað mær, at ein slík fólkaatkvøða verður seinni í heyst, sigur Kaj Leo Johannesen

Mynd: Jens Kr. Vang

# Kendi seg ikki provokeraðan

**Formaður Sambandsfloksins, Kaj Leo Johannesen, heldur, at ólavsøkurøða løgmans var væl avvigað, og hann heldur ikki, at røðan var merkt av, at løgtingsval stundar til**

ÓLAVSØKURØÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Eg haldi, at ólavsøkurøðan var góð, og løgmaður nam við nógv ymiskt viðurskifti í samfelagnum. Røðan fevndi bæði um tað, sum er lagt aftur um og mál, sum liggja fyri framman. Røðan var breið og semjusøkjandi.

Formaður Sambandsfloksins, Kaj Leo Johannesen, heldur ikki, at tað lýsti av røðuni, at løgtingsval stundar til.

- Løgmaður segði einki, sum kom óvart á meg og okkum í Sambandsflokkinum. Í so máta kom einki óvæntað fram í ljósmála – og at kalla einki, sum vit ikki vistu av frammanundan.

### Valskipanin

Kaj Leo sigur, at tað einasta óvæntaða í røðuni var, at løgmaður skjeyt upp at hava eina fólkaatkvøðu um valskipanina, nú aftur verður tosað um at skipa Føroyar sum eitt valdømi.

- Hetta er heilt vist ein áhugaverdur tanki, sum eg taki undir við. Eg kundi hugsað mær, at ein slík fólkaatkvøða verður seinni í heyst. Hinvegin er tað ein spurningur, nær ein møgulig broytt valskipan verður sett í gildi.

Formaður Sambandsfloksins vísir á, at seinastu tríggir formenninir, sum Sambandsflokkurin hevur havt síðan 1990, hava persónliga verið fyri, at Føroyar verða skipaðar sum eitt valdømi.

- Men hetta hevur ikki verið eitt flokskmál. Kortini meti eg, at meiriluti er í Sambandsflokkinum fyri at skipa Føroyar sum eitt valdømi, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Ikki provokeraður

Hann heldur, at tað, sum løgmaður segði um ríkisrættarligu støðuna, var væl avvigað og – sum hann tekur til – slett ikki provokerandi fyri Sambandsflokkin.

- Eg haldi, at løgmaður nýtti tey røttu orðini, tá hann greiddi frá hesum viðurskiftum, sigur formaðurin.

Spurdur, um Sambandsflokkurin uttan trupulleikar kann liva við teimum yvirtøkum, sum framdar eru í hesum valskeiðnum, vísir hann á, at flokkurin altíð vil virka fyri tí, sum til eina og hvørja tíð tænir fólkinum best.

- Vit hava soleiðis ongar trupulleikar av framdu yvirtøkunum, ei heldur yvirtøkuni av vinnufelagslóggávuni, sum sambært samgonguskjalinum verður yvirtikin 1. januar 2008, sigur Kaj Leo Johannesen.



- Stór ósemja er um broytingar í vallógini, bæði í samgonguni og í politisku flokkunum sum heild. Eg haldi slett ikki, at broytingar skulu fremjast í løtuni, sigur Anfinn Kallsberg, formaður Fólkafloksins

Mynd: Jens Kr. Vang

# Ein varislig ólavsøkurøða

**- Í røðu síni staðfesti løgmaður tað, sum komið er burtur úr í hesum samgonguskeiði. Hetta er tað, sum vit kunnu vænta, nú valskeiðið líður móti endanum, sigur formaður Fólkafloksins, Anfinn Kallsberg**

ÓLAVSØKURØÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Ólavsøkurøðan var ógvuliga varislig. Hon var á ongan hátt bombastisk, men heldur konstanterandi. Tað er rímiligt at gera status uppundir endan av einum valskeiði.

Tað heldur Anfinn Kallsberg, formaður Fólkafloksins.

### Startskotið

- Eg haldi ikki, at røðan sum so var merkt av, at løgtingsval stundar til, og tað var einki, sum skurraði mær í oyrunum. Hinvegin skulu vit hava í huga, at hetta er røða løgmans.

Í ólavsøkurøðuni boðaði løgmaður frá, at visjónsætlaninar ætlandi verða lagdar fyri løgtingið til aðalorðaskifti í heyst.

- Tað verður væntandi her, at startskotið til komandi løgtingsval byrjar, heldur Anfinn Kallsberg.

### Vallógin

Formaður Fólkafloksins er ikki samdur við løgmanni um, at fólkaatkvøða um eina nýggja valskipan eigur at verða til heystar.

- Hetta er eitt mál, sum hevur verið uppi og vent av og á, og hetta er eisini eitt mál, sum stór ósemja er um, bæði í samgonguni og í politisku flokkunum.

Anfinn Kallsberg heldur slett ikki, at vallógin skal broytast í løtuni.

Hann heldur tað snøgt sagt vera burtur við at gera slíkar broytingar so seint í einum samgonguskeiði.

### Løgtingið avger

- Men tá tíðin er búgvin, havi eg mitt egna uppskot um, hvussu hetta skal gerast.

Formaður Fólkafloksins vísir á,

tað í seinasta enda verður løgtingið, sum kemur at gera av, hvussu gongdin í málinum verður – og um talan verður um fólkaatkvøðu um hetta mál ella ikki.